# Morris Minor – síggja út sum spildur-nýggir




*Til ber at ogna sær ein Morris Minor, ið sær út sum spildurnýggjur frá fyritøkuni "Charles Wares Morris Minor Centre" í suðurenska býnum Bath*



*Bilarnir verða bygdir upp av nýggjum, um t.d. teir berandi lutirnir eru rustaðir, verða teir skiftir út við nýggjar lutir*



*Hesir vóru nógv brúktir sum arbeiðsbilar í Føroyum í 50 og 60-unum, bæði sum pick-up og sum innilokaður vørubilur. Ein bilur sum hesin kostar 3.850 pund, umleið 42.000 krónur*

## Morris Minor (sedan)

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,1 litur 4 syl. bensin 50 hk |
| 0-80 km/t | 14,8 sek |
| Bensinnýtsla | 14-15 km/l |
| Dekkstødd | 5.00 x 14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 376,0 cm |
| Breidd | 155,0 cm |
| Hædd | 152,0 cm |
| Eginvekt | 750 kg |
| (Data frá 1966) | |

**Í Onglandi er ein fyritøka sum framvegis heldur lív í Morris Minor. Talan er um fyritøkuna "Charles Ware`s Morris Minor Centre" í suðurenska býnum Bath. Bilarnir eru í besta standi og kunnu keypast fyri millum 2 og 4.000 pund**





*Sigird av Reyni (1916-1994), sum stovnaði fyritøkuna Reyni Service í Rættará í 1947, var umboðsmaður fyri Morris bilarnar í Føroyum og seldi nógvar Minor. Á myndini er ein Morris Oxford, ein Leyland lastbilur við krana, og ein Morris Minor pick-up*

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í Onglandi koyra enn í dag umleið 150.000 Morris Minor, sum fyrstu ferð komu á marknaðin í 1948. Her hjá okkum vóru teir eisini væl umtóktir tann tíð tað var, serliga sum pick-up og vørubilar.

Tað er fyritøkan "Charles Ware`s Morris Minor Centre" í suðurenska býnum Bath, sum síðan 1976 hevur spesialiserað seg í at restaurera Morris Minor í teimum ymisku útgávunum.

Í Onglandi verða bilarnir seldir fyri millum 2 og 4.000 pund. Hetta er tað sama sum ein umleið 8 ára gamal bilur í somu støðd kostar. Tey flestu sum keypa hesar bilarnar í Onglandi brúka teir dagliga. Teir er lættir at umvæla og bíligir at koyra í, bensinnýtslan er umleið 14-15 km/l.

Bilarnir verða bygdir upp av nýggjum. Um t.d. teir berandi lutirnir eru rustaðir, verða teir skiftir út við nýggjar lutir, sum koma frá eini indiskari verksmiðju, ið fyritøkan samstarvar við.

Tað mest áhugaverda við hesum bilum er, at teir síggja út sum spildurnýggir.

Adressan er: Charles Ware's Morris Minor Centre, Charlton Buildings, Lower Bristol Road, Bath, BA2 3EA. Fleiri upplýsingar eru at finna á heimasíðuni: www.morrisminor.org.uk